

ur



verða eisini mótasýningar við Navia og Insito.

Klokkan 20 syngur Hanus G. Johansen, og klokkan 21 verður sangløta við trúboðanarskipinum, Juvel.

Stóra tiltakið, sum flestu vaksnu munnu gleða seg til, er dansurin við Halli Joensen Band, sum byrjar í tjaldinum klokkan 23 leygarkvøldið.

# Pláss fyri øllum

**- Borðtennisfelagið Nykur hevur givið pláss fyri bæði børnum, vaksnum, tilkomnum og eldri, eins og felagið eisini hevur givið pláss fyri fólki, sum búgva á bústovni. Her er pláss fyri øllum, sigur formaðurin í Nyki, Kristian í Stórustovu**



*Áhugin fyri borðtennis á Toftum er stórur, og í FM-kappingini í vetur hevur felagið Nykur – longu eftir fyrsta árið - tryggjað sær tilsamans 29 FM-medaljur í flestu deildum*

Vilmund Jacobsen

Í fjør summar stovnaðu fólk á Toftum borðtennisfelagið Nykur. Á almennum fundi vórðu fimm fólk vald í nevnd, og eisini vórðu tveir tiltakslimir valdir. Formaður gjørdist Kristian í Stórustovu, sum er giftur á Toftum. Í september varð farið undir at tekna limir, og sum tíðin er liðin, er limatalið í dag 153.

Nykur søkti Nes kommunu um venjingartímar, og felagið fekk tveir tímar týskvøld frá 21-23 og tríggjar tímar fríggjadag frá klokkan 15-18. Tað eydnaðist eisini felagnum eftir avtalu at sleppa at venja leygarkvøld frá klokkan 18-21, tá eingin annar aktivitetur er í fimleikarhøllini.

## Formaðurin ovfarin

Kristian í Stórustovu er ovfarin um stóru undirtøkuna, sum felagið hevur fingið, men vísir á, at felagið hevði ynskt sær, at venjingartímarnir vóru fleiri, eins hann hevði ynskt, at venjingartíðirnar vóru meiri passandi.

- At venja eitt týskvøld frá klokkan 21-23, er ov seint hjá børnum, og fríggjadag frá klokkan 15-18 er trupult at fáa venjarar, ið hava arbeiði at røkja, tí arbeiðsdagurin er ikki lokin, tá venjingarnar byrja.

Hann vísir á, at felagið hevur stóran stuðul í nøkrum ungum monnum og dreingjum, sum sjálvir byrjaðu at venja í fjør heyst.

- Hesir hava verið á venjaraskeið, og teir hava verið felagnum ein ótrúligur stuðul – ikki minst fríggjadag, sum hevur verið dagurin hjá børnunum.

Kristian í Stórustovu er errin av, at nýggja felagið á Toftum longu hevur eitt so stórt limatal.

- Sjálvandi eru hetta ikki alt aktivir limir, men flestu teirra, sum hava teknað seg, hava eisini verið og vant. Hinvegin plagar talið av børnum millum 7 og 14 ár, sum venja fríggjadag, at liggja millum 40 og 65, og tað er eitt stórt tal. Aftrat hesum koma so tey vaksnu, sum venja týsdag og leygardag.

## Pláss til øll

Kristian í Stórustovu sigur, at Nykur hevur givið pláss fyri bæði børnum, vaksnum, tilkomnum og eldri, eins og felagið eisini hevur givið pláss fyri fólki, sum búgva á bústovni.

- Longu í byrjanini vórðu vit spurd, um vit vildu geva pláss fyri nøkrum ungum monnum, sum búgva á bústovnum í Runavík, og her hava einir 6-8 mans verið óførir at vitjað og hava vant borðtennis í felagnum. Hetta eru øll fitt fólk, og hetta hevur riggað serstakliga væl. Eg haldi, at ungu menninir hava trivist ógvuliga væl í skúlanum og hava fingið væl burtur úr.

Formaðurin í Nyki vísir á, at nú summarið stundar til, verða venjingarnar ikki tær somu, sum tær hava verið, men felagið kundi ynskt sær, at tey mest ágrýtnu høvdu eitt venjingarkvøld um vikuna í eina tíð enn.

- Tá so heystið kemur, fara vit í gongd aftur við góðum treysti, og vit vóna, at felagið tá fær fleiri og betri hóskandi venjingartíðir.

## 29 FM medaljur

Í fleiri ár var borðtennis ein av ítróttargreinunum, sum íðkaðar vóru á Toftum, men tá lógu venjingarnar og virksemið annars undir B68. Soleiðis høvdu børn og vaksin á Toftum høvi at venja borðtennis frá fyrra helmingi av áttatiárunum fram til endan av nítiárunum. B68 hevði tá borðtennis fyri bæði dreingir og gentur, og felagið hevði nógv góð úrslit at vísa á hesi árini, harav ein hóp av FM-heitum.

Kristian í Stórustovu er ógvuliga fegin um og errin av hesum fyrsta árinum hjá Nyki.

- Nú allar kappingarnar fyri árið í ár eru loknar, hava leikarar hjá okkum tryggjað sær ikki færri enn 29 FM-medaljur í bæði gentu-og dreingjadeildunum. Hetta eru medaljur, sum eru vunnar heilt úr yngstu deildum upp í vaksnammannadeildir, sigur hann.

Umstøðurnar til borðtennisvenjingar í nýggja partinum av skúlanum eru ógvuliga góðar.

- Vit hava eina frálíka fimleikarhøll, har pláss er fyri umleið 12 borðtennisborðum. Í løtuni eigur felagið 4 borð, og haraftrat læna vit onnur fýra borð, so vit hava átta borð tilsamans. Vit kundu hugsað okkum nøkur borð aftrat, og vit vóna at fáa ein høvuðssponsor til felagið, sum tíðin gongur, soleiðis at rásarúmið at útvega felagnum bestu amboðini verður so gott sum gjørligt, sigur Kristian í Stórustovu, formaður í borðtennisfelagnum Nyki.



*Kristian í Stórustovu er formaður í borðtennisfelagnum Nykur. Her teknar Havstein Ellingsgaard seg sum lim í felagnum*

vilmund@sosialurin.fo